

*Oddageinin*

# Einki frægari at skriva um?

Kanska bara fullveldi megnar at bjóða av, tá vit skulu finna okkurt, sum koyrir Føroyar meira í tvíningar, enn fótbólturin ger tað. Summi elska hann og onnur hata hann, men áhugin er so mikið stórur, at tað slepst ikki undan honum

Nú Sosialurin tólvta árið á rað kemur við einari serútgávu, ið burturav snýr seg um tilstundandi fótbóltskappingina, slepst neyvan undan, at onkur fer at spyrja okkum spurningin í yvirskriftini. Og tað er kanska heldur ikki so løgið, tí fótbólturin tekur nógv pláss í føroysku miðlamyndini, meðan kappingin er í gongd – og enntá rættiliga nógv, tá hon liggur still. So tey, ið slett ikki hava áhuga fyri fótbólti, hava óivað ilt við at skilja, at fótbólturin skal hava so nógv at siga fyri so mong. Men tað hevur hann!

Tað munnu vera fá arbeiðspláss, har mánadagsprátið frá várinum og út á heystið ikki so ella so kemur inn á fótbólt, og soleiðis hevur fótbólturin eina savnandi funktión, sum í øllum førum forðar fyri, at kaffisteðgurin verður ein pínlig løta, har øll bara sita og hyggja upp á hvønnannan, uttan at vita, hvat tey skulu siga. Gamaní, hava ikki øll eina meining um sjálvt spælið, men mong hava, og tá er tað so skjótt, at eisini tey minni áhugaðu verða drigin við í prátið.

Kanska bara fullveldi megnar at bjóða av, tá vit skulu finna okkurt, sum koyrir Føroyar meira í tvíningar, enn fótbólturin ger tað. Summi elska hann og onnur hata hann, men áhugin er so mikið stórur, at tað slepst ikki undan honum. Og við árunum er tað blivin ein sannroynd, at ein og hvør miðil við virðing fyri sær sjálvum og sínum brúkarum, eisini syrgir fyri at fylgja við í, hvat hendir í fótbóltinum, tí annars er skjótt at verða afturútsigldur.

Við skiftandi manning og stíli hevur Sosialurin í mong harrans ár verið roknaður sum Føroya fremsti fótbóltsmiðil, og vit síggja onga orsøk til, at tann vanahugsanin millum manna skal broytast. Aftur í ár ætla vit at fylgja væl við, hvat rørir seg í føroyska fótbóltsheiminum, sum nú á døgum eisini røkkur út um landoddarnar. Stílurin verður kanska ikki tann sami, sum hann altíð hevur verið, men tað hoyrir jú tíðini til, at tú torir at flyta teg og royna okkurt, sum kanska er eitt sindur øðrvísi. Men enn sum áður verður fingurin hildin tætt at pulsinum, so lesarin ikki verður snýttur fyri nakað, men gjøgnum Sosialin kann fylgja væl við.

Spennandi samrøður, stuttligir vinklar og forkunnugar søgur vera hetta fótbóltsárið okkara fremstu amboð, tá vit fylgja lands- og steypakappingini frá byrjan til enda, umframt landsliðum og øðrum, ið rørir seg. Henda serútgáva er bara startskotið til enn eitt spennandi kappingarár, har Sosialurin fer at gera sítt til, at lesarin fær so nógv við sum gjørligt. Vit royna at skjóta breitt í hesi útgávuni, so yvirblikkið kann fáast upp á pláss, áðrenn bríkslað verður í gongd av álvara, og so helma vit annars ikki í, men halda fram við at skriva um fótbóltin – so leingi einki frægari er at skriva um …

*Hilmar Jan Hansen*

**Sosialurin**

Postsmoga 76
110 Tórshavn
Tel 341800
www.sosialurin.fo
post@sosialurin.fo

**Blaðstjórn:**
Hilmar Jan Hansen

**Blaðfólk:**
Jóannes Hansen
Jákup Mørk
Rólant Waag Dam
Uni Holm Johannesen
Eirikur í Jákupsstovu
Heri Simonsen
Tróndur Arge

**Myndafólk:**
Álvur Haraldsen
Hilmar Jan Hansen
Jens Kristian Vang

**Sniðgeving og umbróting:**
Pætur Eyðunsson Jensen
Simona Weihe

**Lýsingar:**
Jaspur Langgaard
Finnbjørg Nattestad

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Prent:**
Prentmiðstøðin

*Tilfar úr hesum blaði kann bert verða endurgivið, um loyvi er fingið til tað frammanundan frá viðkomandi blað- ella myndafólki*